# Morgunlesturin

ERIK
BISKOPSTØ



Tað var rørandi at síggja gomlu slitnu bønfaldaðu hendurnar í Degi og viku, sum nú hava mist eitt fast stavnhald í gerandisdegnum.

Valið hjá nýggju leiðsluni í ÚF at strika endursendingina av morgunlestrinum virkar bæði arrogant og óumhugsað. Vónandi verður mistakið rættað sum skjótast.

**Dagligt breyð hjá teimum gomlu**

Sjálvur eigi eg eina 88 ára gamla ommu. Hon býr heima og er sera frísk og væl fyri. Hon elskar at byrja dagin við einum drekkamunni og morgunlestrinum. Eg haldi, at hon fær eina góða felagskenslu av at lýða á og syngja við, ímeðan orðið fer um alt landið. Hon er sera vónbrotin av avgerðini hjá ÚF-leiðsluni. Hon heldur, at dagurin er nóg fyltur við undirhaldi og tónleiki og skilir ikki, at man tekur hesa løtu við signing burtur uttan víðari. Hin omma mín, sum nú er deyð, sat altíð klár við sálmabókini og sang við, tá ið morgunlestur var á skránni.

Hetta við morgunlestrinum er ein so stórur partur av serføroyska kristna siðaarvinum, at tað er óskiljandi, sum fer fram í løtuni. Eisini er tað at siga, at tað eru ikki bert tey gomlu, sum hava gleði av morgunlestrinum. Tað eru fólk í øllum aldri, sum fáa gleði og signing av hesi løtu.

**Public Service**

At senda tað í SvF í staðin er als ikki tað sama. Tá verður Tingvarpið avbrotið, sum eisini er Public Service. Áhugavert kundi eisini verið at sæð hasa kanningina, sum ÚF-leiðslan sipar til. Sum eg havi skilt, var lurtað minni eftir ÚF frá kl. 10 og úteftir í forhold til fyrr um morgunin. Tað kann eisini vera, tí at fólk hava ikki somu stundir at lurta eftir kl. 10. Og hvat so um fólk skifta eina løtu eftir kl 10? ÚF fær nogvar lurtararnar aftur til tíðindini á middegi.

Vit liva í eini tíð, har fólk hava lætt við at skifta ímillum ymisk tilboð. Tað er eisini eitt frælsi, sum vit øll hava. Eg veit ikki, hvar hesin tvangstankin kemur frá at skula hava fastatøkur á lurtarunum alla tíðina. Sjálvt BBC, sum helst er ein av heimsins bestu Public Service støðum, hevur ikki lurtarar og hyggjarar alla tíðina.

Tað munnu vera fáar sendingar sum raka so væl Public Service hugtakið, sum júst morgunlesturin - her er gott og uppbyggjandi innihald, sum varðveitir føroyska mentan og siðaarv. Tað er skrivað av vælútbúnum fólki, sum duga væl at orða seg og nýta vakurt føroyskt mál. Innihald og formur eru á einum høgum støði.

**Fjølbroytni í ÚF**

Føroyingar eru sera góðir við ÚF, tí tað hevur givið okkum so mangt gott í ein mansaldur. Har hevur verið fjølbroytt tilfar - ikki minst til børnini og tey eldru. Hjá mongum eldri fólki stendur tólið stillað inn á ÚF allan dagin.

Tá ið Morgunlesturin byrjaði í ÚF fyri umleið 50 árum síðani, var tað relativt stórur partur av sendiflatuni, tí ÚF sendi ikki so nógvar tímar. Í dag sendir ÚF alt døgnið og roynt verður at trýsta morgunlesturin niður í næstan onki. Tað sær út, sum arvurin eftir eitt nú Axel Tórgarð ikki er høgt í metum hjá stovninum í dag. Men tað er skjótt at bróta niður. Tað kann tykjast sum um, at tað er farin fram ein heldur stór útskifting í ÚF, har man ikki í nóg stóran mun hevur "gefühl", men heldur hugsar um marknað og lurtarakanningar.

Hvat fáa vit ístaðin kunnu vit spyrja? Jú morgunsendingin verður strekt 10 minuttir longur, helst við minst einum lagi. Um vit koyra endursendingina av morgunlestrinum burtur, missa vit meira fyri minni.

ÚF missir onki, um føroyingar eru góðir við aðrar rásir eisini.

# Endursendið morgunlesturin

**Kringvarp Føroya
Tórshavn
att.: Annika Mittún Jacobsen**

Tað hevur vakt stóran ans og miklan harm kring landið, nú Kringvarp Føroya hevur tikið tað óskiljandi avgerð at taka endursendingina av morgunlestrinum í útvarpinum av skránni, og mongd av fólki hava saman við Kristiligum Lurtarafelag, Føroya Biskupi og Fólkakirkjuni vent sær til Kringvarpið við áheitan um at fáa hetta aftur á skránna.

Undirritaðu løgtingsmenn úr øllum flokkum á tingi fara við hesum inniliga at heita á stjóran og programmleiðsluna í Kringvarpinum um at vísa øllum hesum áheitanum ta virðing at seta endursendingina av morgunlestrinum á skránna hjá útvarpinum aftur beinanvegin.

**Vinarliga**

*Bjarni Djurholm*
*Alfred Olsen*
*Kári P. Højgaard*
*Heini O. Heinesen*
*Andrias Petersen*
*Bill Justinussen*
*Jógvan á Lakjuni*
*Helgi Abrahamsen*
*Kári Petersen*
*Heðin Zachariassen*
*Annita á Fríðriksmørk*
*Eyðgunn Samuelsen*
*John Johannesen*
*Rodmundur Nielsen*
*Karsten Hansen*
*Edmund Joensen*
*Anfinn Kallsberg*
*Bjørn Kalsø*
*Poul Michelsen*
*Mikkjal Sørensen*
*Tórbjørn Jacobsen*
*Jaspur Vang*
*Jákup Mikkelsen*
*Gerhard Lognberg*
*Vinjard Johansen*
*Marjus Dam*

# Tað gera tey í Zimbabwe og Russlandi

EDVARD Í
SKORÐINI
JOENSEN
journalistur



Í londum sum Zimbabwe og Russlandi hava politisku myndugleikarnir ein veikleika, sum vit í vesturheiminum vanliga halda lítið um. Tey hava eina øgiliga trongd til at vilja blanda seg upp í, hvat lokala pressan ger. Altso stjórnirnar í hesum londum.

Soleiðis gera vit ikki í mentaða heiminum er norðan- og vestanfyri. Ikki stjórnirnar í hvussu er.

Tó við einum undantaki kortini. Í Føroyum hevur lóggevandi tingið, Guð hjálpi mær, funnið uppá, at tað skal "heita á" leiðsluna í landsins almenna kringvarpi um at leggja ávísa sending ávísa tíð á degnum. Slíkt er óhoyrt í siviliseraðum landi.

Tað er sjálvsagt, at biskupur og próstur, prestafelag, fyristøðufólk á ellisheimum og sambýlum, pensionistafelagskapir og hundraðtals privatpersónar heita á Kringvarp Føroya um ikki at flyta morgunlesturin. Tingfólk kundu so passandi lisið og hildið seg til Matteus 22.21.

Persónliga haldi eg, at hasir tíggju minuttirnir kundu gott verið latnir teimum, sum lurta eftir hasi sendingini. Tey eru nógv. Kenni persónliga fleiri, sum harmast um hasa avgerðina.

Men at landsins lóggevandi forsamling skal blanda seg í slíkt umsitingarligt mál, hóast tað enn bara var við eini áheitan, er nokk so langt úti. Hvat verður tað næsta? Skal Løgtingið kanska velja ein programnevnd til Kringvarpið og eina sensurnevnd fyri pressuna sum heild? Tað gera tey í londum sum Zimbabwe og Russlandi. Onkra klára løtu megnaði Jeltsin tó at taka hetta av, men eftirmenn hansara hava innsett góða, gamla KGB eftirlitið við pressuni aftur. Og teir journalistar, sum eru so mikið tápuligir, at teir siga sína meining, verða bara skotnir. So er friður.

Ikki tí. Í Føroyum er hetta ikki ókent kortini, at tingmenn vilja blanda seg í slíkar avgerðir. Tí hevur til dømis Strandferðslan livað við í áravís. Varð ein ferðaætlan lýst, var næstan víst, at lokali tingmaðurin reisti stórmál á Løgtingi fyri at flyta rutuna ein hálvan tíma ella nakrar fjórðingar til næstu bygd, sum eisini skuldi hava sjóvegis samband við umheimin. Slíkar eru treytirnar, umsitingin virkar undir í Føroyum. Og vit grenja um, at hon er dýr. Vælsignaði tingfólk.

Fáið handan Sandoyartunnilin gjørdan, so vit um ikki annað sleppa undan klandri um ferðaætlanina hjá Teistanum í framtíðini.

Men kanska var tað bara eitt kærkomið høvi hjá tingfólki at lætta samvitskuna mótvegis stóra skaranum av pensionistum?

So ivaleyst átti Kringvarpið at sent morgunlesturin aftur fyrrapart. Tingfólk hava í hvussu er brúk fyri nøkrum góðum og uppbyggjandi orðum, áðrenn tey fara til arbeiðis.

# Meira útbúgvingartilboð her og nú í Føroyum

PÆTUR
NICLASEN



Tað var eitt rættuliga jaligt valstríð, sum var fyri valið í fjør. Allir flokkar tosaðu jaliga um fleiri útbúgvingarmøguleikar og nýggjar skúlar, hettar fyri at halda uppá tað unga fólki, sum býr í Føroyum.

Føroyar skuldi verða eitt vitunarsamfelag.

Tað er staðfest, at ein stórur partur av tí unga fólkinum, sum fer uttalanda at lesa, ikki kemur aftur til Føroyar eftir lestrarenda og serliga eru tað, tær ungu kvinnurnar, sum ikki koma aftur.

Hettar førir við sær at Føroyar missur ein stóran part av sínum dýrgripum, sum tað unga fólki er.

Núverandi fíggjarlóg leggur ikki upp til, at fleiri útbúgvingar skulla verða í Føroyum, ella at verandi útbúgvingarmøguleikar skulu betrast.

Heldur tvørturímóti.

Vit hoyra bert um skerjingar á útbúgvingarøkinum, bæði á hægri lestrarstovnum og eisini í fólkaskúlanum.

Tað vil siga, at ein onki gerð, fyri at halda uppá tað unga fólki, sum ætla at fáa sær eina hægri útbúgving. Tey verða tvingaði, at fáa sær eina útbúgving uttanlanda.

Vit skula ikki langt vekk fyri at sýggja hvat fyri fylgir ein sovorin politikur kann føra til fyri Føroyar.

Okkara nærmastu grannar fyri eystan, Hetland, har er fólkatalið minka í stórum, og tað eru tey ungu, sum eru flutt burtur og ikki koma aftur. Fólkatalið er minka við meira enn einum 1/3 eftir nøkrum fáa árum.

So vælsignaðu valdsharrar, satsi heldur uppá útbúgving, legg líka í um undirskot er á fíggjarlógini nú og kanska nøkur ár fram.

Sýggji hettar heldur sum eina sunna íløgu, í okkara dýrabærasta tilfongið, ungdómin, fyri at tryggja vøkstur í Føroyum í framtíðini, heldur enn sum eina útreiðslu sum veksur um undirskotið á fíggjarlógini.

Tað er ongin framtíð fyri Føroyar, uttan ein vælskúlaðan ungdóm.